FISKIVINNUTÍÐINDI

94 tons á gólvsøluni í gjár

Gott veður var týsdagin og mikudagin var nógvur fiskur á gólvsøluni. 94 tons vóru seld. harav 48 tons á Toftum, 40 tons í Klaksvík, 4,6 tons á Tvøroyri og gott hálvt tons í Vágum.

Av teimum 94 tonsunum var mesti parturin, 84 tons toskur. Rignaprísurin er nú komin upp um 50 krónur fyri kiloið og í gjár vóru 4,462 kiloav rogni á uppboðssøluni.

je

Syslunummar	Skipanavn	kilo
FD 18	SIRIÐ	77
FD 79	HAVØRNIN	134
FD 117	GERÐISBÁTURIN	37
FD 123	RIDDARIN	147
FD 138	BYRGI	1.289
FD 15	ANNA MARIA	1.494
FD 183	VÍGDIS	47
FD 193	MARNA	1.643
FD 222	GAMLI EDVARD	1.049
FD 229	CAMILLA	1.269
FD 256	AENASKER	55
FD 263	RÚNI	856
FD 283	ÁLITIÐ	1.104
FD 312	BRODDUR	196
FD 316	ANNFRÍÐ	518
FD 324	VÁTANES	158
FD 377	JULIA	1.365
FD 406	ALMA-J	161
FD 428	MARGIT J	196
FD 437	MUNKURIN 3	738
FD 460	SAFIR	1.875
FD 512	NABBI	990
FD 557	FISKIVARÐI	143
FD 67	HULDUSTEINUR	1.075
FD 68	ROYNDIN FRÍÐA	478
FD 753	MARIA	125
FD 761	GUNNVÁ	1.876
FD 775	LANGANES	1.039
FD 784	VÓNIN	1.765
FD 842	NICOLINA	54
FD 865	BÁRAN	309
FD 89	HØVDIN	1.265
FD 905	TRÚGVI	145
FD 954	VØRÐAN	138
FD1096	RINGLASTEINUR	47
FD1098	BYLGJAN	47
FD1108	LUNA	310
FD1110	ARCTIC	16
FD1130	SJÓBÚGVIN	1.917
FD1140	EYÐIN	1.459
KG 101	NEVIÐ	1.064
KG 112	BLÁABERG	713
KG 123	HÁENNI	2.477
KG 125	BJARNABERG	331
KG 127	SKURÐAKLETTUR	1.749
KG 129	BRATTABERG	668
KG 143	KALLANES	38
KG 170	ELJAN	877
KG 276	SKORHAMAR	645
KG 288	HELTNIN	992
KG 296	GLÆMAN	510
KG 301	MÁSASTEINUR	655
KG 323	TURIÐ	2.748
KG 378	SKØRIN	190
KG 430	BÁRAN	689
KG 444	HEIÐABRÚGV	805
KG 45	RANDI	540
KG 452	BEINISSVØRÐ	91
KG 480	HVÍTABRÚGV	934
KG 514	DÚGVAN	736
KG 575	BIRGIT C.	663
KG 587	REYNSMÚLI	3.374
KG 6	JENS CHR. SVABO	92
KG 601	STEINSBRÚGV	21
KG 608	HERDIS	346
KG 63	POLLUR	172
KG 640	HANSA	725
KG 661	RÝPAN	255
KG 666	SJÓVARFOSSUR	340
KG 708	VÁRSÓL	767
KG 743	ELSA	1.083
KG 744	OSLA	4.282
KG 79	NEVIÐ REYÐA	2.252
KG 832	BORGIN	1.503
KG 92	ØLDAN	1.133
SA 280	SNIGÁLVUR	894
SA 350	HVESSINGUR	901
TG 178	MAJ	77
TG 20	HEIMDAL	1.241
TG 267	HVÍTIKLETTUR	739
TG 284	HAMRABERG	2.075
TG 303	RICHARD Í SMIÐJUNI	826
TG 310	SJÓRIDDARIN	973
TG 360	RANKIN	81
TG 376	DÚGVAN	2.107
TG 397	KVIKK	365
TG 495	EGIL M	460
TG 528	GRANI	481
TG 562	TODNES	1.005
TG 597	TORSTEIN	1.725
TG 622	VARÐIN	1.689
TG 63	TURIÐ	35
TG 670	VÍKABERG	2.143
TG 731	ANNIE M/B	718
TG 744	MARJUN	441
TN 119	PAX	32
TN 213	LÍRABERG	273
TN 325	RÁDNI	963
TN 381	SANCY	553
TN 422	NÓN	2.129
TN 805	ANNA	110
TN 91	LÓMUR	353
TN 964	HVÍTIFOSSUR	572
TN1053	KJÓGVIN	466
VA 141	ÁLKUKLETTUR M/B	404
VA 164	NIKLÁI	125
VA 269	ANNA MARIA M/B	842
VA 28	ÁLITIÐ	337
VA 324	SKARVUR	917
VA 34	DUNGA HANS M/B	292
VA 367	MIÐHAV	724
VA 60	DÁVA DÁNJAL	860
VA 717	STÍGANES	163
VN 125	ÆGIR	183
VN 152	SJÓARFOSSUR	931
VN 408	JÓNVØR	1.519
VN 430	RUÐITANGI	451

21 skip á telefonupp-boðssøluni

Jústinus Leivsson
Eidesgaard

Ikki færri enn 21 skip seldu á telefonuppboðssøluni hjá Fiskamarknaði Føroya mikudagin. Bestu einstøku søluna hevði Norðleivur FD 659, hann seldi 2,760 kilo fyri 66,978 krónur. Miðalprísurin var 24,27. Næst bestu einstøku søluna hevði Skarðhamar úr Skopun, sum seldi 6.590 kilo fyri 156.668 krónur. Miðalprísurin var kr. 23,77.

Miðalprísurin á toski var 20,68, á hýsu kr. 15,70 og á upsa 5,45.

Íslendsk lodnuskip á Fuglafjørð

Íslendski nótabáturin Beitir er á veg á Fuglafjørð fullastaður av lodnu. Hann hevur 1100 tons av lodnu. Hann hevur fiskað lodnuna á Eysturlandinum. Í ár er hent tað óvanliga, at lodnan hevur tikið seg upp bæði á Eysturlandinum og á Vesturlandinum í senn. Lodnan á Vesturlandinum gýtir í løtuni, meðan tann á Eysturlandinum er ikki komin so langt enn.

Christian í Grótinum var á Fuglafirði týsdagin og landaði 2000 tons av svartkjafti. Teir royna í løtuni vestanfyri Írland. Krúnborg var mánadagin á Fuglafirði við 22 tonsum av svartkjafti, sum er fingin á somu leið.

je

Sjórøvarar í Vágahavinum

Í seinastu viku varð herverk framt móti línureiðskapinum hjá útróðrarbátinum Volunteer, meðan línan stóð vestanfyri á Toftum:

SJÓRØVARAR
Edvard Joensen

Útróðrarbáturin Volunteer av Toftum kundi komið illa fyri vestan fyri í seinastu viku. Meðan línan stóð, hevði onkur skorið eina boyu oman av og skotið hol á tríggjar aðrar. Fingu teir enda, kundu teir mist útgerð fyri út móti 100.000,- krónum.

Jack Højgaard, skipari á Volunteer, sigur, at hann ongantíð hevur verið út fyri slíkum øll tey mongu árini, hann hevur róð út. Og heldur ikki hevur hann hoyrt um tað fyrr. Hann metir hendingina so álvarsliga, at hann hevur meldað hetta til løgregluna. Hann vendi sær eisini til Vaktar- og Bjargingartænastuna og boðaði frá tí, sum hent var.

Løgreglan í Runavík váttar, at teir hava fingið fráboðanina og meta málið sum herverk. Av løgreglustøðini verður sagt, at teir hava ongantíð havt slíkt mál fyrr.



Jack Højgaard sigur frá, at teir høvdu sett vestur úr Høvdanum, sum so mangan. Teir høvdu 8 miðurúm standandi. Vanliga er lína, sum svarar til eina sjey stampar í hvørjum miðurúmi, og so boya á. Volunteer hevur egningarmaskinu og setir av stokkum.

Miðuboyurnar eru júst ætlaðar sum ein trygd, um teir fáa enda. Men tá hendan trygdin verður oyðiløgd av reinum ólevnaði, kann tað gerast álvarsligt, um línan slitnar. Tíbetur var eingin endi hendan dagin, og Volunteer fekk alla línuna aftur.

Jack Højgaard sigur, at endaboyan stóð, meðan tann seinasta miðuboyan var skorin omanav. Stong við boyu og forgangara. Alt skorið burtur. Síðan vóru nummar tvey og trý skotnar. Tann næsta aftur stóð, meðan so aftur ein, sum var skotin.

Boyurnar, sum hava verið fyri herverki, eru skotnar við vanligari høglbyrsu. Hol er á boyuni, og høglini liggja inni í boyuni.

Sosialurin skilir, at tað dámar ikki øllum snellumonnunum, at línubátar seta á leiðum, sum snellumenninir líkasum kanna sær. Hvussu tað skal skiljast, undrast fleiri á. Hendan dagin var Volunteer einar 10 fjórðingar úr landi, og tað er so eingin óvanlig línuleið.

Hinvegin kenna línumenn einki til, at havið er fest, soleiðis at summir partar av flotanum eiga ávísar leiðir.

Av Vaktar- og Bjargingartænastuni verður váttað, at tey hava fingið fráboðanina frá Volunteer, men kunnu einki gera annað enn at biða skipini halda eyguni eftir slíkum, meðan tey sigla runt.

Hinvegin ber illa til at ákæra nakran fyri at hava skotið boyur, uttan at hava sað tað, sum hent er.

Tað eydnaðist ikki, áðrenn blaðið fór til prentingar, at finna nakran løgfrøðing, sum kundi siga okkum, hvar ein møgulig revsing fyri slíkt mál kann væntast at liggja.

Vísa ongum frá sær

Tað er ikki rætt, at Hotel Føroyar vísir fólki frá sær, sigur Áki Jespersen á Smyril Line í viðmerking til grein í blaðnum týsdagin

FERÐAVINNA
Edvard Joensen

Í grein í blaðnum týsdagin varð sagt, at ferðafólk, sum komu til Hotel Føroyar og Vallarheimið Tórshavn, kundu risikera at verða burturvíst, um tey ikki vóru komin til Føroya við Norrønu.

Í greini týsdagin er onkur misskiljing komin fyri, og skal blaðmaðurin taka á seg, at eg eftir øllum at døma ikki havi skilt Áka Jespersen rætt.

Í greinini varð sagt, at ferðafólk, sum komu til Føroya við flogfari, kundu koma út fyri at verða avvíst á Hotel Føroyum og Vallaraheiminum Tórshavn, sum Smyril Line eigur, um tey ikki vóru komin til Føroya við Norrønu.

Hetta er ikki rætt skilt, sigur Áki Jespersen, ferðafólkaleiðari á Smyril Line, í viðmerking við Sosialiin.

Hann sigur, at hotellið setir øll pláss, sum ikki eru seld ein mánað fram í tíðina, leys. Sostatt er altíð møguleiki at fáa innivist á hotellinum, um ikki er fysiskt útselt, og allar sengur fullar, sigur hann.

Men fyri vallaraheimið er tað soleiðis, at bert verða hýst inn ferðandi sum koma við Norrønu. Tó er møguleiki hjá øðrum - tey sum á fakmáli verða nevnd walkin – at bíleggja sær pláss sama dag sum tey koma, sigur Áki Jespersen.

Hetta er tó bert galdandi í summarsiglingarskeiðnum hjá Norrønu – aðrartíðir av árinum takað vit ímóti øllum bíleggingum.

Vit biða Smyril Line orskað misskiljingina og vænta hervið, at hon er rættað.